# ...ýrinum




nevndini eru ávikavist Bjørt Samuelsen og Kári P. Højgaard.

vilmund@sosialurin.fo

# Marin fer at svimja um Nólsoyarfjørð

**SVIMJING Tað verða ikki bara teir kendu og minni kendu svimjararnir, sum fara at svimja um Nólsoyarfjørð leygarmorgunin á ovastevnu. Millum tey, sum hava teknað luttøku, er eitt nú Marin Heinesen, ið hevur gjørt seg galdandi í ymiskum ítróttargreinum, sum krevja nógva venjing og orku**

Vilmund Jacobsen

Ein av føstu tættunum á ovastevnu seinastu nógvu árini, er svimjingin um Nólsoyarfjørð. Okkurt einstakt ár hevur ikki verið svomið um fjørðin júst hendan dagin, tí streymur ella veður tarnaðu. Hetta er tó bara hent einar tvær ferðir, síðan farið varð undir hetta tiltak sum partur av ovastevnu. Í fjør var soleiðis bæði vindur og regn, og tí var svimjingin útsett, soleiðis at svomið varð tvær vikur seinni.

Tann, sum nú á trettanda sinni fer at skipa fyri hesi serstøku svimjikapping, er Erlendur Simonsen, sum býr á Hvítanesi og giftur Joan úr Nólsoy.

Sjálvur hevur hann eisini verið við øll árini, og tá svimjararnir leypa á bláman í Havn leygarmorgunin, verður hann eisini við.

Erlendur sigur, at hóast hann hevur bæði verið fyriskipari og luttakari øll hesi mongu ár, er hann ongantíð vorðin fyrstur út um fjørðin.

Spurdur, um hann ætlar sær at vinna hesaferð, sigur hann lítillátin, at tað lyfti vil hann ikki geva nøkrum.

– Men eins og áður fari eg at luttaka – og fyri meg ræður tað í fyrsta lagi um at vera við og klára at svimja teinin um fjørðin.

Erlendur Simonsen hevur fullført henda langa teinin á hvørjum ári øll hesi 12 árini.

– Eg ætli mær eisini at vinna á mál í Nólsoy hesaferð, sigur hann.

## Ein kvinna

Hvussu stór luttøkan verður, tá svimjingin byrjar stundisliga leygarmorgunin, var ikki heilt greitt, tá Sosialurin tosaði við Erlend Simonsen og Evald Rasmussen seinnapartin hósdagin.

– Higartil hava fimm menn og ein kvinna teknað luttøku, men tað er væl hugsandi, at onnur koma við, sigur Evald Rasmussen, ið líka sum hevur tikið sær av praktisku uppgávunum hesaferð, nú Erlendur Simonsen uppundir tiltakið hevur verið burturstaddur.




*Erlendur Simonsen (t.v.) tók í sínari tíð stig til Nólsoyarsvimjingina, sum nú verður á trettanda sinni leygardagin. Høgrumegin er Rói í Dali, sum gjørdist fyrstur um fjørðin seinasta ár*

*Mynd: Jóan Pauli í Dali*

Millum tey, sum hava teknað seg til svimjingina um Nólsoyarfjørð leygarmorgunin, er havnargentan, Marin Heinesen, ið hevur gjørt seg galdandi í ymiskum ítróttargreinum, sum krevja nógv venjing og orku.

Evald Rasmussen sigur, at sjóvarfallið í Nólsoyarfriði verður soleiðis leygardagin, at teir, sum hava skil á streymi, mæla til, at lopið verður á bláman um 8-tíðina.

– Kyrrindi eru í Nólsoyarfirði klokkan 9, og okkum dámar best at leypa út í umleið ein tíma fyri kyrrindini, leggur hann aftrat.

Evald Rasmussen hevur svomið átta ferðir um Nólsoyarfjørð. Hann hevur verið fyrstur um fjørðin tríggjar ferðir – og er annars endaður á øðrum plássi hini árini.

## Rói vann í fjør

Vinnarin av Nólsoyarsvimjingini í fjør gjørdist Rói í Dali, sum hesaferð luttók á fyrsta sinni.

Rói svam um fjørðin upp á ein tíma og umleið 26 minuttir, og næstur honum var Erlendur Simonsen, sum var nakrar minuttir seinni á málinum.

– Eg fari eisini at luttaka hesaferð, nú svomið verður aftur leygardagin, men eg eri ógvuliga ivingarsamur, um eg fari at megna at endurtaka sigurin. Mítt mál er at svimja um fjørðin upp á minni enn tveir tímar. Hvussu langt hetta so fer at røkka í kappingini, kann bara tíðin vísa, sigur Rói í Dali, vinnari í fjør.

**»...eg ætli mær eisini at vinna á mál í Nólsoy hesaferð...**

ERLENDUR SIMONSEN

**»...mítt mál er at svimja um fjørðin upp á minni enn tveir tímar...**

RÓI Í DALI

# Ein sorgarsøga

Vilmund Jacobsen

Annar minnilutin í vinnunevndini, sum er Bjørt Samuelsen, umboðandi Tjóðveldi, harmast í sínum tilmæli um, at kjakið um broytingarnar í lógini um vinnuligan fiskiskap ofta endar í kegli um, hvørt ein hevur álit á ráðgevingini frá Havstovuni og ICES.

– Eg haldi tað vera eina sorgarsøgu, at politiski myndugleikin heldur fram at lata oyruni aftur fyri fremstu lívfrøðiligu ráðgevingini, eins og fyri búskaparligu ráðgevingini. Á henda hátt hevur politiska skipanin fremstu ábyrgd fyri, at okkara fiskivinna verður hildin í einum avoldaðum formi og ikki kemur fram at teimum rationaliseringum og teirri nýmenning, sum vinnuni tørvar, sigur Bjørt Samuelsen, umboð Tjóðveldisins.